Teitur spælir í Europa

Eftir nógvar framførslur í USA seinastu vikurnar, er Teitur Lassen nú komin til Europa at spæla. Hann skal fyrst og fremst spæla í Norðurlondum, men hevur eisini onkrar framførslur í Hollandi

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Teitur Lassen spældi í gjárkvøldið í Aalborg, og tað er ein av fleiri framførslum, sum hann komandi vikurnar skal hava í Norðurlondum. Í kvøld spælir Teitur í Horsens, og síðani koma konsertir í Århus og Keypmannahavn.

Teitur skal komandi vikurnar eisini spæla í Malmø, Oslo, Bergen, Gøteborg og í Rødovre, har hann fyrr í ár vann árligu tónleikavirðislønina.

Teitur skal í døgunum frá 9. til 11. mars hava tríggjar konsertir í Hollandi. Hann spælir í Amsterdam, Rotterdam og í Tilburg.

Síðani standa Kanada, Ongland og USA aftur á skránni, og serliga í USA verður nógv gjørt við at lata Teitur spæla sínar sangir. Frá flaggdegnum og ein mánað fram skal Teitur hava 16 framførslur ymstastaðni í USA – alt frá Los Angeles til Chicago og New York.

Teitur var herfyri við í tónleikasendingini hjá CNN International, sum sæst av einum stórum milliónatali kring allan heimin. Slíkt er við til at seta ferð á yrkisleiðina hjá Teiti sum tónleikara.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Árni Gregersen, Bornholm, argr@tv2bornholm.dk
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Hvussu nær er hóttanin?

Bumbuspreingingarnar í Madrid hava mint okkum á, at terror aftur er í Europa og harvið eisini í nærumhvørvinum.

Tað er sjálvandi eins ræðuligt, tá ið slíkt hendir aðrastaðni enn í Europa, men upp á ein ella annan hátt kennist tað meira viðkomandi, tá ið tað hendir í Europa.

Tað sigur seg eisini sjálvt. Vit føroyingar eru eitt ferðandi fólk. Sjálvandi ferðast føroyingar um allan heim, men mest í Europa.

Kemur terrorin enn nærri, so skal ikki so nógv til fyrr enn ein føroyingur er staddur nær við.

Alt hetta ljóðar eitt sindur nalvaskoðandi: er tað ein føroyingur, sum verður raktur, so er tað verri enn um tað er onkur vit ikki kenna ella vita um.

Bumbuspreingingarnar hava fingið fólk her í Danmark at hugsa. Tá ið danska stjórnin valdi at fara uppí kríggið í Irak saman við USA og øðrum, var ikki serliga hørð mótstøða. Tosað varð lítið um avleiðingarnar, sum kundu koma seinni.

Nú er støðan ein heilt onnur. Fólk tsa um nær slíkt hendir í Danmark. Mong nevna, at bæði London og Keypmannahavn standa næst á listanum yvir bumbumál.

Í Føroyum eru vit vanliga ikki bangin fyri, at slíkt skal henda. Føroyar er eitt friðarligt land. Fólk hava livað í friði í túsund ár - stórt sæð.

Eg hugsi bara mangan um, at tað at búgva í einum friðarligum landi, kemur ikki av sær sjálvum. Demokrati og frælsi kemur heldur ikki av sær sjálvum.

Tey fólk, sum búgva í einum landi, seta sjálvi fortrteytirnar.

Í Føroyum hava tær verið góðar í nógv ár, men tey seinastu 10 árini hava vist, at vit eiga at verja tey virðir, sum skapt eru. Nevniniliga virðir sum talufrælsi og demokrati.

Talufrælsi er fortreyt fyri demokrati. Øll hava rætt at siga sína hugsan. Í Føroyum - og her á Bornholm - gera tey tað eisini. Eitt sereyðkenni fyri smá samfeløg er, at ótrúliga mong siga sína hugsan alment.

Grundleggjandi er tað gott, og mangan eisini uppbyggjandi. Hinvegin hendir tað eisini viðhvørt, at almenna orðaskifti fer av sporinum. Ongin kann koma við einum positivum tanka, uttan at fleiri skunda sær í fjølmiðlarnar og undirgrava hesar tankar.

Tann rætturin er fantastiskur at hava. Hugsa bert um, hvussu manga staðni fólk als ikki sleppa at siga sína hugsan. Hjá okkum kunnu vit bæði siga okkara hugsan, og vit kunnu eisini gera viðmerkingar til hugsanina hjá øðrum.

Hesin rætturin er so dýrabærur, at vit eiga at verja hann væl, men ikki misbrúka hann. Viðhvørt kundu vit hugsa okkum um eina eyka ferð, áðrenn vit skjóta tað onnur siga, niður.

Eg haldi, at tað at kunna liva í einum friðarligum og frælsum landi krevur, at vit hava virðing fyri øðrum, og sjónarmiðunum hjá øðrum. Tað er eisini neyðugt, at royna at fáa sjónarmiðini at nærkast hvørjum øðrum.

Skulu vit framhaldandi hava tey rættindi vit hava í dag mugu tey virðast. Tey skulu brúkast - eisini til fulnar - men ikki hvørja ferð.

Vit venda aftur til bumbuspreingingarnar: hvat hava tær við talufrælsi at gera?

Jú – tosa vit saman hampuliga, so skal nógv til áðrenn vit fara eftir bumbunum. Kenna vit hvønnannan, er ikki neyðugt við bumbum. Hetta er tað vit hava liva efitir í Norðurlondum í nógv.

Hav orðaskifti og nógvar meiningar, men lat vera við at eitra orðaskiftið.

ítróttur

Nr. 56 • leygardagur • 20. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Hondbóltsstøður

1. Deild menn

	dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	7	5	0	2	490	433	57	16
2 Neistin	7	5	0	2	488	456	32	16
3 Kyndil	7	3	1	3	502	473	29	16
4 StÍF	7	3	0	4	441	419	22	13
5 H71	7	2	1	4	420	486	-66	7
6 KÍF	7	2	0	5	459	533	-74	7

Oddabrak í Vestmanna

Endaspurturin í føroysku hondbóltskappingini er av álvara farin í gongd, og spenningurin er í hæddini. Í mansdeildini liggja trý lið jøvn í stigum á fremsta plássi, og tvey teirra, VÍF og Neistin, hittast í einum sannum oddabraki í Vestmanna sunnudagin

HONDBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Sjáldan hevur hondbóltskappingin hjá monnum verið so spennandi sum í ár. Nú einans trý umfør eru eftir at leika, liggja Kyndil, VÍF og Neistin jøvn í stigum á fremsta plássi í deildini, og leikskráin er so hegnisliga løgd, at júst hesi trý lið hittast í innanhýsis dystum í teimum trimum seinastu leikumførunum.

Avgerandi dystur í Vestmanna

Í umfarinum hetta vikuskifti er dysturin í Vestmanna millum mansliðini hjá VÍF og Neistanum uttan iva tann mest áhugaverði. Vestmenningar vóru av teimum flestu avskrivaðir sum eitt boð upp á føroyameistaraheitið, men teimum spádómum hava teir gjørt dyggiliga fyri skommum, og nú tykjast teir kanska verða besta boðið upp á ein føroyameistara.

VÍF hevur vunnið teir seinastu fimm dystirnar á rað, meðan hini bæði oddaliðini hava verið munandi meiri óstøðug. Harafturat er vert at hava í huga, at liðið hjá vestmenningum er mannað við rættuliga royndum leikarum, ið so at siga allir hava verið við til at gerast føroyameistarar áður, og tað kann verða ein stórur fyrimunur í avgerandi dystum.

Neistamenn kunnu tó saktans eisini taka dystin upp við vestmenningar, og tað er neyvan ov nógv sagt, at Neistin hevur sterkastu bakketuna í landinum við so skotsterkum monnum sum Heina Hanusarson, Áka Mørk og Dragisa Stojovic. Til dystin í Vestmanna noyðist Neistin tó at verða strikuspælaran Birgir Kass fyri uttan, eftir at hann fekk reyða kortið í dystinum móti strandingum sunnudagin. Sum skilst verður tó Karl Oddmar Rasmussen við aftur, eftir at hann hevur verið burtur í nakrar vikur, og tað er ein styrkur fyri verjuna hjá Neistanum.

Eingin ivi er um týdningin av dystinum í Vestmanna, og nógv vilja verða við, at liðið, ið tapir dystin sunnudagin, er úti av kappingini um føroyameistaraheitið. Um so er, er ilt at meta um, men eingin ivi er um, at vinnandi liðið hevur sera góð kort á hondini.

Kyndil skal reisa seg

Oddaliðið at kalla alt kappingarárið, Kyndil, hevur snávað meiri enn eina ferð seinastu vikurnar. Í farnu viku var danski venjarin sendur til hús, og tveir gamlir kyndilsleikarar, Kári Nielsen og Birgir Hansen, hava tikið við sum venjarar hjá besta mansliðnum. Seinasta viku var enn einaferð staðfest, at Kyndil hevur stórar trupulleikar við at fáa gongd á spælið hjá sær, tá ið teir fyri triðju ferð í hesum kappingarárinum noyddust at lúta fyri hoyvíkingum.

Kyndil skal sunnudagin dystast við KÍF, og tað er trupult at spáa um, hvussu tað fer at ganga, tí Kyndil hevur ikki verið sannførandi seinastu tíðina, og harafturat hava kollfirðingar spælt mongum eitt puss, og hava teir ein góðan dag, kann alt henda. Seinast hesu bæði lið hittust, gjørdist talan um málríkasta dystin í hesum kappingarárinum, tá ið Kyndil vann 42-40 í Hoyvíkshøllini.

Seinasti mansdysturin hetta vikuskiftið verður í høllini á Skála í dag, tá ið StÍF fær vitjan av H71. Hesi bæði liðini eru úti av kappingini um meistaraheitið, og serliga á Strondum man tað verða ein beiskur biti at svølgja, nú teir hava verið við í oddinum so leingi, og harafturat hava teir spælt rættuliga væl, men hava manglað tað neyðuga hepni.

Botnuppgerð hjá kvinnunum

Hjá kvinnunum eru eisini tríggir dystir á skránni. Mest spennandi dysturin er helst dysturin í Vestmanna millum VÍF og Neistan, ið liggja á ávikavist triðja og fjórða plássið. Hesin dysturin verður beint undan mansdystinum sunnudagin. Í dag verður ein dystur á Skála, har heimaliðið StÍF fær vitjan av einum av biðlarunum tið meistaraheitið VB. Her skuldi talan allarhelst verið um ein avgreiðslusigur til vágskvinnur, áðrenn tær komandi vikuskifti skulu leika tann altavgerandi dystinum móti hinum oddaliðnum Stjørnuni í Vági.

Seinasti kvinnudysturin hetta vikuskiftið er ein rein botnuppgerð, tá ið tey bæði aftastu liðini, Kyndil og Søljan, hittast í Havn. Hesi bæði liðini liggja avbyrgd í botninum av deildini, og bæði royna at sleppa undan at enda aftast í kappingini.

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur
1. deild kvinnur

Dagf.	Kl.	Dystur	Dómarar
20.03	14.30	StÍF-VB	Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen
21.03	14.30	Kyndil-Søljan	Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen
21.03	14.30	VÍF-Neistin	Hannis Wardum & Uni Wardum

1. deild menn

20.03	16.00	StÍF-H71	Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen
21.03	16.00	Kyndil-KÍF	Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen
21.03	16.00	VÍF-Neistin	Hannis Wardum & Uni Wardum

Flogbóltur
Meistaradeild kvinnur

20.03	14.00	ÍF-Mjølnir	Tummas Óli Mortensen & Jan Hentze
20.03	15.00	TB-KÍF	Fleyr

Meistaradeild menn

20.03	1600	ÍF-Mjølnir	Tummas Óli Mortensen & Jan Hentze
20.03	16.00	Fleyr-SÍ	Fram

Kappingin um løgmanssteypið
Bólkur 1

Dagf.	Dystur	Dómari
20.03	NSÍ-B36	Oddmar Andreasen
20.03	FSV-KÍ	Dagfinn Olsen

Bólkur 2

20.03	TB-GÍ	Páll Augustinussen
21.03	B68-ÍF	Lassin Isaksen

Bólkur 3

20.03	HB-EB/S	Niklas á Líðarenda
20.03	VB-Skála	Birgir Sondum

Bólkaspælið í Løgmanssteypinum í gongd

Hetta vikuskiftið fer kappingin um Løgmanssteypið av álvara á rull, og onkrir áhugaverdir dystir eru á skránni

LØGMANSSTEYPIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Fótboltskappingarárið 2004 er so smátt farið í gongd. Hetta vikuskiftið byrjar bólkaspælið í kappingini um Løgmanssteypið, og tað merkir, at nú fara liðini í 1. deild eisini til verka. Seks dystir eru á skránni, og onkur teirra tykist rættuliga áhugaverdur.

Spennandi dystur í Runavík

Tann dysturin, sum á pappírinum sær mest spennandi út, er dysturin í bólki 1 millum NSÍ og B36. Runavíkingar hava staðið seg væl seinastu árini, og havnarfelagið hevur kanska sterkasta hópin í landinum. Hetta er samstundis ein dystur millum steypavinnararnar seinastu tvey árini, NSÍ í 2002 og B36 í 2003, so lagt er upp til ein spennandi dyst.

Sunnudagin verður ein dystur á Toftum í bólki tvey, har uppflytararnir úr Fuglafirði koma at vitja B68. ÍF hevur av álvara spent seg út undan hesum kappingarárinum, meðan B68 hevur mist nokk so fitt av fólk, so spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer á Toftum.

Nógv hevur eisini verið tosað um stjørnumanningina hjá HB, og hvussu sterk honið veruleikanum er, fáa vit kanska at vita seinnapartin í dag, tá ið 100 ársfelagið fær vitjan av EB/Streymi í Gundadali. Sundalagsmenn hava mist nakað av fólki, men onkur nýggjur er eisini komin til. Í blaðnum týsdagin fara vit at hava frásagnir frá dystunum í kappingini um Løgmanssteypið.